# Leggja dent á býarmenning í vesturbýnum

**Heildarætlanin fyri Tórshavnar Kommunu er júst dagførd, og í mun til uppranaligu ætlanina er nú ætlanin at leggja størri dent á at menna vesturbýin og Argir**

BÝARMENNING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Heildarætlanin fyri Tórshavnar Kommunu er gjørd fyri eitt tíðarskeið, sum er frá 2005 og fram til 2022. Broytingarnar í heildarætlanini innibera, at ætlaðar byggingar og útstykkingar vestanfyri verður framskundaðar, og samstundis verður ikki lagt so stórt trýst á Hoyvíkshagan so tíðliga í heildarætlanarskeiðnum, sum ætlanin annars hevur verið.


*Jógvan Arge, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar Býráð, sigur, at tað er neyðugt at fáa javnvág í menningini av býnum, og tí verður størri dentur nú lagdur á menningina av vesturbýnum.*

*savnsmynd*

### Landið darvar býarmenningini

Byggi- og býarskipanarnevndin hjá Tórshavnar Kommunu hevur ásannað, at ætlanirnar fyri menning av vestaru býarpørtunum ikki hevur verið nóg góð, og tí verður roynt at bøta um hetta.

Ein trupulleiki við menningini í økinum er tann, at kommunan hevur latið landinum fleiri stór øki til almennar stovnar og bygningar, uttan at nakað tó hendir hesum viðvíkjandi.

Millum annað hava leingi verið ætlanir um ein miðnámsdepil í Marknagili, uttan at nakað er hent, og eisini hevur Fróðskaparsetrið fingið lendi til gávus nærheindis ætlaða miðnámsdeplinum, men heldur ikki her sær út til, at nýtsla verður gjørd av lendinum.

Tórshavnar Býráð heldur tað verða óheppið, at stórar víddir liggja ónýttar mitt inni í býarpørtum, tí tá ber illa til at fáa teir at rigga sum tann heild, ið teir eiga at vera.

Av somu orsøk umhugsar kommunan at seta treytir fyri, hvussu skjótt ella nær, ið byggjast kann, tá ið lendi verður latið tí almenna. Um ikki bygt verður innan eitt ávíst áramál, vil býráðið, at lendið kann latast til annað endamál, og at tað almenna fær útvega lendi aðrastaðnis.

### Ætla at stykkja út í vesturbýnum

Hesi seinnu árini hava at kalla allar nýggjar útstykkingar av økjum til bústaðarbygging í høvuðsstaðnum verið antin í Hoyvíkshaganum ella á Hamarinum á Argjum, men nú eru eisini ætlanir um útstykkingar aðrastaðnis, soleiðis at býurin verður snaraður eitt sindur vesturá.

Millum annað er ætlanin at binda saman Norðasta Horn og Miðhorn, og somuleiðis er ætlanin at fara undir útstykking Undir Vesturvarða í Flatnahaga. Undir Vesturvarða liggur beint oman fyri Marknagil.

Jógvan Arge, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini hjá býráðnum, sigur, at tað ræður um hjá kommununi at fáa javnvág í menningina av býnum, og tí verður størri dentur nú lagdur á økið vestanfyri.

# Býráðið keypt kirkjugarð

**Tórshavnar Býráð samtykti hóskvøldið at keypa eina ong á Argjum, tí at ein partur av spitalska kirkjugarðinum á Argjum er á ognini**

BÝRÁÐSARBEIÐI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ognin, ið talan er um, liggur beint oman fyri støðna, og beint uttan fyri minnisvarðan á Argjum. Á 600 fermetra stóru ognini standa eini gomul hús. Keypsprísurin er 760.000 krónur.

Fornminnissavnið hevur gjørt rannsóknir á staðnum fyri fleirim árum síðani og staðfesti, at grevstur er í stykkinum. Komið varð niður á fleiri kistur.

### Hevur ligið sum byggiøki

Jógvan Arge, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar Býráð, sigur, at argjafólk hava altíð virt hendan gamla kirkjugarð, og tí hevur einans verið hoyggjað á økinum og ikki velt.

Ongin friðing er nakrantíð gjørd av økinum, har kirkjugarðurin hjá teimum spitalsku liggur. Ístaðin liggur økið sum byggiøki, og tí helt Tórshavnar Kommuna tað verða rættast at keypa ognina og harvið tryggja sær, at hon seinni ikki skuldi út í stríð við ein møguligan nýggjan eigara um at friða økið, sigur Jógvan Arge.

Í fleiri øldir vóru tey, sum fingu spitalsku skjúku, burturløgd á hospitalinum á Argjum, har rúm var fyri 12 sjúklingum. Tá ið tey andaðust, vóru tey grivin beint oman fyri spitalska hospital.

# Dømdur fyri at rópa ókvæmisorð móti løgregluni

**Tað er ikki ráðiligt at rópa fuck you, og at vísa fremstafingur fyri løgregluni**

LØGREGLUMÁL
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Ein ungur maður varð mánamorgunin dømdur fimm dagbøtur á 150 kr. fyri, tvær ferðir somu nátt, at rópa fuck you og at vísa fremstafingur móti tveimum løgreglumonnum, sum vóru úti í arbeiðsøridum. Hendingarnar fóru fram eina leygarnátt í august 2005. Fyrru ferðina var talan um, at løgreglubilur kom koyrandi framvið Steinatúni í Havn, og tann 20 ára gamli, sum hevði fingið nakað nógv at drekka, lat øðina ganga út yvir løgregluna. Umleið ein tíma seinni var tað aftur sami ungi maðurin, sum var úti um seg, hesaferð uttanfyri náttklubban Cleopatra, har løgreglan var komin í samband við harðskap. Hesaferð bleiv tað ov nógv hjá løgreglumonnunum, sum valdu at skuldseta unga mannin fyri brot á grein 121 í revsilógini, sum sn‡r seg um ókvæmisorð móti løgregluni. Sambært ákæranum, er tað sera sjáldan, at nakar verður dømdur sambært hesari grein.

## Nýggj útstykking í Kaldbak

**Á býráðsfundi hóskvøldið samtykti Tórshavnar Býráð at fara undir eina nýggja útstykking í Kaldbak**

ÚTSTYKKING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í fyrstu atløgu er talan um eina lutfalsliga lítla útstykking við eini átta ella nýggjum grundøkjum. Henda útstykking verður gjørd innan fyri dagstovnin Flatnagarð, og avtala er longu gjørd við HMP Consult í Havn um projektering av útstykkingini.

### Stórur áhugi

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at tað er stórur áhugi fyri grundstykkjum í Kaldbak, og væntandi verða fleiri útstykkingar gjørdar næstu árini í bygdini.

Staðbundnu limirnir í Kaldbaksnevndini hjá Tòrshavnar Býráð hava mælt til, at kommunan arbeiðir fram ímóti, at útstykkja verður aðrastaðnis í bygdini, møguliga frá barnagarðinum og út móti sjálvari bygdini. Her hava teir serliga hugsað um støddina av bygdini, og hvussu bygdin verður meira samansjóðað, og trivnaðurin harvið betur.

Samstundis sum at nýggja útstykkingin verður gjørd, fer kommunan undir at ogna sær lendið bæði innan fyri og uttan fyri dagstovnin Flatnagarð til nýggjar útstykkingar.